

## Hús í Tórshavn til sølu

Húsini við Íslandsveg 6 verða við hesum lýst til sølu, áhugaði kunnu ringja

**316095/211169 ella 269081**

Tekna teg sum haldara nú fyri einans

**400,- um ársfjórðingin**




# KUNNGERÐ

### Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 135a og 32a, Argir

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 16. desember 2010 hevur samtykt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 135a og 32a á Argjum.

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um skipan og bygging á ognunum matr. nr. 135a og 32a við Garðsgøtu.

Serstaka byggisamtyktin fevnir um ognirnar 32a, 135a, 135e og 135f, Argir.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 10. til og við 31. januar 2011, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 21. februar 2011.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Ítróttarsosialurin altíð við har tað hendir



# Samskipari
til Vinnuframagrunnin



ENDURLÝSING:

Vinnuframagrunnurin sóknast eftir samskipara at standa fyri umsitingini av fjøltáttaða virkseminum hjá Vinnuframagrunninum.

Sum samskipari ert tú tað neyðuga millumliðið millum umsøkjarar við tí góða hugskotinum og stýrið, ið tekur avgerðirnar um, hvussu tær umleið 4 mió kr. hvørt ár verða býttar millum tær mongu og áhugaverdu umsóknirnar um stuðul.

**Uppgávur**
Sum samskipari hjá Vinnuframagrunninum skalt tú:

- vera við til at menna íverksetaraumhvørvi kring landið
- duga at fáa eyga á tey góðu hugskotini
- marknaðarføra møguleikarnar, sum Vinnuframagrunnurin bjóðar
- samstarva við stýrið fyri Vinnuframagrunnin um eina góða og gjøgnumskygda viðgerð av øllum umsóknum
- standa fyri skrivstovuhaldinum hjá umsitingini
- svara fyrispurningum og vegleiða fólki í at skriva umsóknir
- finna rættar metarar til umsóknir
- røkja heimasíðuna vfg.fo og Ráðgevarabankan
- gera kunnandi og upplýsandi arbeiði kring alt landið um møguleikar og virksemið hjá Vinnuframagrunninum
- hava eftirlit við játtaðum umsóknum
- hava eftirlit við játtanini hjá Vinnuframagrunninum

Harumframt fært tú ábyrgdina av øllum teimum mongu, ymisku uppgávunum, sum alla tíðina stinga seg upp.

Rætti persónurin er fyrikomandi, dugir væl at samskifta, orðar seg lættliga, og er sinnað/ur at veita øllum ta bestu tænastuna, um tað so er smiðurin úr Sandavági ella sniðgevin av Skála, sum skal hava ráðgeving. Hon/hann skal hava góð samstarvsevni, innlit í fíggjarstýring og gott innlit í føroyska vinnulívið og í nýskapan og íverksetan. Evnini at síggja ta stóru myndina eru eisini týdningarmikil.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at tú hevur akademiska bakgrund t.d búskaparfrøðingur ella samfelagsfrøðingur.

Talan er um fulltíðar starv. Lønin sambært avtalu við grundarlagi í sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Vilt tú vita meira, ber til at ringja til Regin W. Dalsgaard, formann í stýrinum fyri Vinnuframagrunnin, telefon 51 27 95.

Umsóknin skal sendast til Vinnuframagrunnin, stílað Regini W. Dalsgaard, stýrisformanni, postboks 3079, FO-110 Tórshavn. Eisini ber til at senda umsóknina við t-posti til vfg@vfg.fo.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. januar 2011.

Les meira um Vinnuframagrunnin á www.vfg.fo

Vinnuframagrunnurin | Hoyvíksvegur 51 | Postboks 3079 | 110 Tórshavn
Tel 31 27 94 | Faks 31 67 03 | vfg@vfg.fo | www.vfg.fo

Vinnuframagrunnurin